Jólaódnin 1988:

# Tjúgu ár síðan harðastu ódn


Bátahylurin á Argjum fekk seg royndan og stóð ikki royndina

**Mánadagin 21. desember og týsdagin 22. desember eru 20 ár liðin, síðan ringasta ódn í fleiri mannaminnir herjaði í Føroyum. Ódnin varð rópt Jólaódnin. Tá ið vindmátarin á Norðadalsskarði varð funnin aftur, niðurdottin, vísti hann 76,7 metrar um sekundið**

Vindmátarin var annars gjørdur til at vísa upp í 80 metrar um sekundið, men tey kønu vita, at Jólaódnin fór upp um hetta hámark. Eingin hevði væntað, at hesin vindmátari ikki stóð mát. Hevði hann verið standandi, hevði hann víst fleiri og 80 metrar um sekundið. Vit vita, at eitt nú tropiska ódnin Gilbert hevur verið væl omanfyri 80 metrar um sekundið. Jólaódnin var eingin leivd av nakrari tropiskari ódn. Hon hevði hvørki kvenn- ella kallnavn. Hon eitur rætt og slætt Jólaódnin. Hon var so ekstremt hørð, at hvørki veður- ella søgufrøðingar vita at siga frá hennara líka.

**Eindømisódnin**

Í 1996 gjørdu teir báðir føroysku lesandi á Danmarks Tekniske Universitet, Jan Poulsen og Einar Brimnes, eina høvuðsuppgávu, sum teir róptu Ekstremvinde på Færøerne. Tað var ein analysa av ekstremari vindferð.

Teir siga, at henda ódnin, ið rakti Føroyar millum 21. og 22. desember 1988, varð lýst at vera tann harðasta í 20. øld. Ódnin gekk í ein landnyrðingeystan norður um Føroyar við eini óvanligari dýpingarferð uppá 2,5 bergeron (60 hPa um samdøgrið). Vindmátingarnar á Glyvursnesi vísa, at hann hækkaði úr útsynningisuðri upp í útnyrðingvestan, og at mest málda miðalvindferðin var 39,2 metrar um sekundið. Men har, ið tað var ábært, var vindferðin nógv, nógv størri enn tað, staðlýsingin vísir á Glyvursnesi. Á Norðadalsskarði, 282 metrar yvir havinum, varð miðalvindferðin 58,9 metrar um sekundið. Okkurt um ein tíma seinni vísti vindmátarin 76,7 metrar um sekundið. Tá var hann vorðin høgur í ættini, so at vindmátarin stóð í skáa av fjallinum í ein útnyrðing úr skarðinum, og tað hevði við sær øgiligar hvirlur. Løtu seini brotnaði vindmátarin, sum annars varð gjørdur til at kunna klára 80 metrar um sekundið. Autoverjan við Oyggjarvegin við Norðadalsskarð einar 100 metrar frá mátaranum skrædnaði, og einstøk pettir av autoverjuni lógu í vegjaðaranum og oman eftir líðuni sum vundið spagetti.


Ovarliga í Niels Finsens gøtu í Havn slættaði ódnin trø niður

Tað lukkaðist ikki Jan Poulsen og Einari Brimnes at fáa at vita, hvussu stórt trýst autoverjan toldi, men tann lítla flatan, ið stóð fyri vindinum, og tað at stólparnir standa grivnir ein lítlan metur niður í jørðina, bendir á vindtrýst av ekstremari megi.

**Tryggingin pakkar**

Jólaódnin í 1988 var úrslitið av tí, veðurfrøðingar rópa ekstratropiskari syklon. Tann materielli skaðin, ið stóðst av ódnini var øgiligur. Sum skilst varð eitt fólk løstað, so tíbetur var tann skaðin samanumtikið lítil. Eitt tað grefligasta dømið um skaða var Skopun. Tað ljóðaði, at fjórðahvørt hús í bygdini varð meira og minni skatt.

Miðlabreytin var hjá Tryggingarfelagnum Føroyum í heyst og spurdi tvey serkøn fólk um viðurskiftini hjá tryggingini fyri og eftir ódnina.

Tey komu til, at endurgjaldið fyri skaða, ið stóðst av Jólaódnini, var einar 150 milliónir krónur. Í 2008 vildu tey mett upphæddina til at liggja útivið 300 milliónir krónur. Tryggingin var býtt sundur í fleiri deildir tá. Í hesum ódnarsambandi var tað deildin Brunatryggingin, ið tók um endan.

Í 1980'unum var ein bráður vøkstur í húsabyggingini í Føroyum. Eitt byggiboom, tey rópa. Tað var mest sum einki fyri at fáa lán. Peningastovnarnir vóru óvanliga fyrikomandi, men tað ólukkuliga var, at tey mongu nýggju húsini vóru undirtryggjað. Sum vanligt dømi tóku tryggingarfólkini ein húsaprís, ið lá um eina millión. Húsini vóru yvirhøvur tryggjað fyri eina hálva millión. Tað bar í sær, at tey, ið høvdu bygt sær hús í teimum óvandu 80'unum, fingu bara hálvt endurgjald fyri skaða.

Eftir Jólaódnina og fyri alt tað eftir eina næstan líka so harða ódn tann 13. januar í 1989, tá ið eitt húski í einum Hosby-sniðhúsum í Klaksvík brádliga sat á berajóli, tí ódnin snýsti alt omanav heilt niður á stovugólvið, vórðu húsini bygd øðrvísi og sterkari. Tað var eitt krav, tí annars kundi henda, at øll hesi veiku, óhóskandi sniðhúsini vórðu vundin til himmals.

Tað stutta av tí langa varð, at endurtryggingarfeløgini uttanlands kravdu at tryggingin varð dýrari. Kosta eini hús eina millión, skulu tey eisini tryggjast fyri eina millión varð kravið. Altso nývirðistryggingar borga fyri tað virðið, sum húsini veruliga eru verd. Og í 1992,